# ÁRSFRÁGREIÐING

Mars 2026



FØROYA RÁFISKAKEYPARAFELAG

# Innihaldsyvirlit

**Yvirlit yvir limirnar** 4

**Frágreiðing frá nevndini** 5

Nevndin í Føroya Ráfiskakeyparafelag 7

Í nevndini sita 7

Limatal í Føroya Ráfiskakeyparafelag 7

Limagjald í Føroya Ráfiskakeyparafelag 7

**Árið ið fór** 8

1. Mál í árinum 8

2. Gongdin í vinnugreinini 12

**Viðtøkur** 16

Viðtøkur felagsins 16

# Yvirlit yvir limirnar

Atlantic Seafood
Delta Seafood
Faroe Origin
Fiskavirkið/PRG
Fofish/Norðfra
Kambur
Kósin
Landshandilin
Nevið
Rainbow Seafood
Sandoy Seafood
Tavan
Vaðhorn Seafood
Vestmanna Seafood

# Frágreiðing frá nevndini

**Árið, ið fór**

Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur, eins og undanfarin ár, arbeitt við at varpa ljós á viðurskifti, sum hava týdning fyri limir felagsins. Felagið hevur roynt at tryggja, at limirnir fáa bestu møguligu karmar at virka undir og at taka lut í samskiftinum við politisku skipanina og almennu myndugleikarnar.

Felagið vil gerast enn sjónligari í almenna rúminum, soleiðis at tað í størri mun kann ávirka kjakið og gerast ein natúrligur hoyringspartur í málum, sum viðvíkja vinnuna.

Á aðalfundinum í 2025 stóðu Jógvan Hansen, Magnus Jespersen og Nicolas Stauss fyri vali. Allir vórðu afturvaldir og hildu fram í nevndini. Eisini varð Dánial Hansen afturvaldur sum tiltakslimur. Eftir aðalfundin skipaði nevndin seg við sama formansskapi sum áður, við Jógvani Hansen sum formanni og Jens Paula Petersen sum næstformanni.

Nevndarlimirnir umboða eisini felagið í øðrum nevndum og ráðum. Jógvan Hansen umboðar felagið í Fiskivinnuráðnum, og Jens Pauli Petersen er varaumboð. Nicolas Stauss umboðar felagið í stýrinum fyri fiskivinnuroyndir, og harumframt røkja Jógvan Hansen og Jens Pauli Petersen eisini nevndarsessirnar hjá felagnum í nevndini fyri Kassamiðstøðini, sum felagið eigur helvtina av.

Ein týðandi partur av virkseminum hjá felagnum er at savna limirnar um fakligt kjak og vitanardeiling. Í hesum sambandi skipaði felagið fyri árliga limatiltakinum í februar 2025, sum varð hildið á Hotel Hilton.

Tiltakið hevði bæði fakligan og sosialan dám, við framløgum um Fiskivinnuroyndir og MSC/FISF skipanina og góðum kjaki millum limirnar. Felagið metir, at slík tiltøk hava stóran týdning fyri at styrkja samstarvið og fakliga grundarlagið í vinnuni.

Betri marknaðaratgongd er framvegis eitt av høvuðsmálunum hjá felagnum. Arbeitt hevur verið fyri at ávirka myndugleikarnar at raðfesta arbeiðið við at tryggja føroyskum fiskaútflytarum betri atgongd til altjóða marknaðir, bæði gjøgnum handils- og heilsufrøðiligar avtalur.

Eitt serliga týdningarmikið framstig í 2025 var, at føroyskir matvøruútflytarar nú hava fingið atgongd til brasilska marknaðin, eftir at heilsufrøðiliga góðkenningin frá brasilsku myndugleikunum loksins er komin upp á pláss.

Hetta kann lata upp fyri nýggjum møguleikum, men enn er ikki komið heilt á mál. Arbeiðið heldur fram í samstarvi við myndugleikar og Uttanríkistænastuna, har millum annað endaliga góðkenningin av vørubólkum og merking hjá feløgunum eisini skal skrásetast og góðkennast av brasilsku myndugleikunum. Í hesum sambandi verður eisini arbeitt saman við Uttanríkistænastuni um at skipa eina vinnuferð til Brasil.

Í september 2025 skipaði Sendistova Føroya í London í samstarvi við Føroya Ráfiskakeyparafelag o.ø. fyri tiltakinum “Sustainable Fisheries in the Faroe Islands” í søguliga Fishmongers’ Hall í London. Formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum, Jógvan Hansen umboðaði felagið og legði í síni framløgu dent á høgu góðskuna á føroyskum fiskavørum og vísti á fjølbroyttu vøruframleiðsluna, sum limirnir í Ráfiskakeyparafelagnum framleiða og útflyta.

Spurningurin um arbeiðsmegi hevur eisini verið nógv frammi seinastu tíðina. Við høga virkseminum og lága arbeiðsloysinum í Føroyum er framvegis avbjóðandi at fáa nóg mikið av starvsfólki til fiskaframleiðslu. Felagið hevur tí arbeitt fyri at varðveita og styrkja skipanir, sum hava týdning fyri vinnuna, herundir fiskavirkisskipanina og fast track-skipanina fyri útlendska arbeiðsmegi.

Metingin hjá felagnum er, at báðar skipanirnar eru avgerandi fyri at tryggja støðugan rakstur og neyðuga arbeiðsmegi í vinnuni.

Nevndin hevur eisini fylgt við gongdini í upsafiskiskapinum, og hevur felagið víst á, at ferð eigur at setast á granskingina av upsastovninum í Føroyum.

**Havn, tann 25. mars 2026**

**Jógvan Hansen**

Formaður

# Nevndin í Føroya Ráfiskakeyparafelag

## Í nevndini sita

- Jógvan Hansen, nevndarformaður
- Jens Pauli Petersen, næstformaður
- Brandur Jacobsen, nevndarlimur
- Magnus Jespersen, nevndarlimur
- Nicolas Stauss, nevndarlimur
- Dánial Hansen, tiltakslimur

## Limatal í Føroya Ráfiskakeyparafelag

Í løtuni eru 14 limir í Føroya Ráfiskakeyparafelag.

## Limagjald í Føroya Ráfiskakeyparafelag

Limagjaldið í Føroya Ráfiskakeyparafelag er 5.000 kr. um árið.

# Árið, ið fór

## 1. Mál í árinum

Niðanfyri er stutt lýsing av nøkrum av teimum málum, sum hava myndað virksemið hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag seinasta árið.

Á aðalfundinum stóðu Jógvan Hansen, Magnus Jespersen og Nicolas Stauss fyri vali. Allir blivu afturvaldir og hildu sostatt fram í nevndini. Eisini Dánial Hansen varð afturvaldur sum tiltakslimur. Eftir aðalfundin skipaði nevndin seg við sama formansskapi sum áðrenn aðalfundin; við Jógvani Hansen sum formanni og Jens Paula Petersen sum næstformanni.

Jógvan Hansen umboðar felagið í Fiskivinnuráðnum, har felagið hevur fastan sess. Jens Pauli Petersen, næstformaður, er varaumboð í Fiskivinnuráðnum.

Eisini hevur nevndarlimur í felagnum umboðað felagið í stýrinum fyri Fiskivinnuroyndir, sum veitir stuðul til verkætlanir at menna fiskivinnuna. Seinastu árini hevur Nicolas Stauss umboðað felagið í stýrinum fyri fiskivinnuroyndir.

Jógvan Hansen og Jens Pauli Petersen røkja eisini nevndarsessirnar hjá felagnum í nevndini fyri Kassamiðstøðini, sum felagið eigur helvtina av.

***Limatiltak um Fiskivinnuroyndir og MSC/FISF***

Føroya Ráfiskakeyparafelag skipaði eisini í 2025 fyri árliga limatiltakinum, sum varð hildið á Hotel Hilton í februar. Eins og undanfarin ár var tiltakið skipað við einum fakligum parti við framløgum og kjaki og hareftir einum sosialum parti.

Í fakliga partinum varð fyrst ein framløga um Fiskivinnuroyndir 2025, har Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, greiddi frá nýskipanini av Fiskivinnuroyndir. Dentur verður frameftir lagdur á vinnuligar verkætlanir innan fyri gransking, menning og nýskapan, og skipanin verður skipað í tvær ymiskar stuðulsskipanir: flaggskipaverkætlanir og smærri verkætlanir. Eftir framløguna var møguleiki at seta spurningar.

Síðani helt Durita í Grótinum eina yvirskipaða framløgu um MSC-skipanina og FISF, har hon greiddi frá bygnaði, virkishátti og fígging av skipanini. Eisini her varð lagt upp til spurningar og kjak millum limirnar.

Fakligi parturin endaði við einum opnum kjaki millum limir felagsins um evnini, sum vóru umrødd. Eftir hetta varð ein steðgur, og um kvøldið bjóðaði felagið til ein sosialan part við døgurða.

Føroya Ráfiskakeyparafelag metir, at tiltakið var væl eydnað, og at slík limatiltøk hava stóran týdning fyri fakliga kjakið og samanhangin í vinnuni.

***Marknaðaratgongd***

Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur sum eitt av sínum aðalmálum at virka fyri, at føroyskir fiskaútflytarar fáa betri marknaðaratgongd. Seinastu árini hevur felagið roynt at sannført myndugleikarnar um at leggja meira orku í at tryggja føroyskum fiskaútflytarum betri marknaðaratgongd. Hetta er galdandi fyri bæði handils- og heilsufrøðiligar avtalur við onnur lond og marknaðir.

Í september 2025 skipaði Sendistova Føroya í London í samstarvi við Føroya Ráfiskakeyparafelag o.ø. fyri tiltakinum “Sustainable Fisheries in the Faroe Islands” í søguliga Fishmongers’ Hall í London. Formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum, Jógvan Hansen, umboðaði felagið og legði í síni framløgu dent á høgu góðskuna á føroyskum fiskavørum og vísti á fjølbroyttu vøruframleiðsluna, sum limirnir í Ráfiskakeyparafelagnum framleiða og útflyta. Eisini vísti hann á drúgvu og góðu handilssambondini, sum hava bundið Føroyar og Bretland saman í mong ár, og at tiltakið vónandi kundi styrkja hesi sambond enn meira.

Kappingarneytar brúka nógva orku upp á at betra um sína marknaðaratgongd, og hjá einum lítlum landi sum Føroyar krevur tað eitt áhaldandi arbeiði frá føroysku myndugleikunum at sannføra myndugleikarnar í øðrum londum um, at tey skulu nýta orku upp á handils- og heilsufrøðiligar avtalur við Føroyar.

Í hesum sambandi var felagið eisini við til at gera eina marknaðarkanning, har flest allir føroyskir fiskaútflytarar vórðu spurdir um tørvin, tá ið tað viðvíkir marknaðaratgongd. Endamálið við kanningini var at fáa eina betri mynd av tørvinum hjá føroysku fiskaútflytarunum.

Tað er neyðugt áhaldandi at arbeiða fyri at betra um atgongdina á so nógvum av teimum áhugaverdu marknaðunum fyri føroyskar fiskavørur sum gjørligt, so tað ber til at útflyta til onnur lond, tá ið umstøðurnar á einum marknaði gerast truplar.

Seinastu árini hava vit sæð fleiri dømi um hetta, eitt nú í Bretlandi í sambandi við Brexit, á russiska marknaðinum eftir innrásina í Ukraina, og seinasta árið eisini í sambandi við hækkandi toll á fiskavørum, sum skulu útflytast til USA.

***Brasil***

Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur í fleiri ár arbeitt miðvíst fyri at fáa atgongd til brasilska marknaðin, og ein av høvuðsforðingunum hevur verið manglandi heilsufrøðilig góðkenning frá brasilsku matvørumyndugleikunum (MAPA). Henda góðkenning er nú loksins komin upp á pláss, og harvið eru nýggir møguleikar latnir upp fyri útflutningi av føroyskum fiskavørum til Brasil.

Í framhaldi av hesum hevur Heilsufrøðiliga starvsstovan sent lista til brasilsku myndugleikarnar yvir føroyskar fyritøkur, sum vilja og lúka treytirnar at útflyta til Brasil. Viðkomandi virkir og skip skulu vera skrásett hjá MAPA, fyri at útflutningur kann fara fram. Harumframt er tað ábyrgdin hjá einstaka framleiðaranum ella útflytaranum at tryggja, at vørubólkar og merking lúka galdandi krøv og verða skrásett og góðkend av brasilsku myndugleikunum.

Føroya Ráfiskakeyparafelag leggur dent á, at hetta er eitt týðandi framstig fyri vinnuna, og at Brasil kann gerast ein áhugaverdur nýggjur marknaður, serliga fyri saltaðar fiskavørur. Samstundis verður arbeitt víðari saman við myndugleikunum og Uttanríkistænastuni um at styrkja sambandið við Brasil, millum annað við einari komandi vinnu- og politiskari ferð, har umboð fyri vinnuna eisini verða við.

***Starvsfólk***

Við høga vinnutíttleikanum og lága arbeiðsloysinum í Føroyum hevur tað til tíðir verið torført at útvega starvsfólk til fiskaframleiðslu.

Seinasta árið hevur kjak javnan verið um fiskavirkisskipanina og framtíð hennara. Í hesum sambandi hava eisini verið frammi sjónarmið um at avtaka skipanina. Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur tó greitt frá, at fyri vanligu flakavirkini kring landið, sum í høvuðsheitum virka botnfisk, hevur fiskavirkisskipanin stóran týdning. Skipanin varð upprunaliga ætlað virkjum, har rávøru-tilgongdin er skiftandi og tengd at fiskiskapinum.

Flakavirkini arbeiða støðugt fyri at tryggja framhaldandi rakstur, og undir skiftandi umstøðum veitir fiskavirkisskipanin starvsfólkunum ein týdningarmiklan tryggleika. Føroya Ráfiskakeypara-felag metir tí, at tað ikki er ráðiligt at avtaka skipanina.

Felagið var eisini við í tilgongdini at gera tað smidligari at seta og hava í starvi starvsfólk úr 3. londum uttan fyri Norðurlondum og ES. Úrslitið var 'fast-track'-skipanin, sum varð sett í verk, so at føroyskir arbeiðsgevarar kunnu vera undangóðkendir at seta starvsfólk úr 3. londum í starv, og umsóknirnar um arbeiðs- og uppihaldsloyvi verða viðgjørdar munandi skjótari enn áður.

Føroya Ráfiskakeyparafelag metir, at fast track-skipanin hevur stóran týdning fyri vinnuna. Hóast skipanin til tíðir hevur verið umrødd á negativan hátt í almenna kjakinum, hevur hon í verki víst seg at virka væl. Kanningar vísa eisini, at limir í felagnum leggja dent á týdningin av skipanini í sambandi við at tryggja arbeiðsmegi.

Samanumtikið metir Føroya Ráfiskakeyparafelag, at bæði fiskavirkisskipanin og fast track-skipanin hava avgerandi týdning fyri vinnuna, og at tað tí er týdningarmikið at varðveita báðar skipanirnar framhaldandi.

***Minkingin í upsafiskiskapinum***

At síggja til er framvegis áhaldandi negativt samband millum ta nøgd av fiski, sum verður alin í Føroyum, og gongdina í upsafiskiskapinum. Tað ber tó enn ikki til at siga, hvørt alingin er orsøk til minkandi upsafiskiskapin.

Føroya Ráfiskakeyparafelag heldur, at hesi viðurskifti eiga at verða kannað nærri, hvørt talan kann vera um ávirkan frá alingini, ella um sambandið er tilvildarligt. Í hesum sambandi hevur felagið eitt nú yvir fyri politisku myndugleikunum víst á týdningin, at hesi viðurskifti eiga at kannast og lýsast betri.

Felagið fegnast tí um, at myndugleikarnir í 2025 settu sjøtul á at kanna, um samanhangur er millum laksaaling og støðuna hjá upsastovninum undir Føroyum. Føroya Ráfiskakeyparafelag metir, at tað eisini er týdningarmikið frá einum breiðum samfelagsligum sjónarhorni at fáa lýst hesi viðurskifti betri. Yvirhøvur er ov lítil vitan um uppvakstrarøkini hjá fiskayngli inni á firðunum; herundir eisini um alingin kann hava eina ávirkan, og um so er, hvussu stór henda ávirkan er. Eitt nú um seiðayngul leitar sær inn í alinótirnar, og tá ið alifiskurin so verður tikin, kann seiðurin enda í kvørnini.

Tað er framvegis ov ógreitt, hvussu stóra ávirkan hetta hevur á tilgongdina av upsa. Felagið hevur víst á, at gransking av upsastovninum eigur at halda fram og vera raðfest enn meir.

***Handilsferðir, tiltøk og messur***

Føroya Ráfiskakeyparafelag roynir áhaldandi at hava eyguni eftir, hvat rørir seg í vinnuni, sum kann hava áhuga fyri limir felagsins, herundir eisini møguleikar fyri handilsferðum og messum.

Í hesum sambandi arbeiðir felagið í løtuni saman við Uttanríkistænastuni um at skipa eina politiska vinnuferð til Brasil, nú tað loksins ber til at útflyta matvørur hartil. Hendan vinnuferð verður væntandi skipað í sambandi við APAS-messuna í São Paulo, sum verður hildin 18.–21. mai 2026.

## 2. Gongdin í vinnugreinini

Niðanfyri er stutt lýsing av gongdini hjá nøkrum av fiskasløgunum í vinnugreinini. Ein av høvuðstrupulleikanum í føroysku botnfiskavinnuni seinnu árini hevur verið og er framvegis manglandi rávøra.

**Avreiðingarnar** av mest vanligu botnfiskasløgunum - hýsu, toski og upsa - sum vera fiskað í føroyskum sjóøki hava í nøgd verið nógv minkandi seinnu árini. 2025 gjørdist tó eitt betri ár enn tey undanfarnu.




Avreiðingarnar í 2024 vóru eisini eitt vet hægri enn í 2023, tá ið avreiðingarnar í nøgd vóru metlágar.

Tískil er gleðiligt, at avreiðingarnøgdirnar hildu fram at vaksa í 2025, tó at nøgdirnar framvegis eru langt frá tí, tær hava verið.

Framgongd var at síggja í øllum trimum fiskasløgunum og samlaða framgongdin í nøgd var knøpp 12.000 tons, úr umleið 27.850 tonsum í 2024 til 39.850 tons í 2025 – ein øking á 39,5% í mun til undanfarna ár.

Veiðan av **hýsu**, sum í 2024 var umleið 4.800 tons, hækkaði við 17%, so nøgdin var góð - 5.600 tons í 2025. Í nøgd var økingin 800 tons. Seinastu árini hevur veiðan eftir hýsu verið eitt vet frægari okkurt av árunum, men er framvegis langt undir miðalveiðuni, um hugt verður yvir eitt longri tíðarskeið.

Veiðan av **upsa**, sum í 2023 var á lægsta støði í nýggjari tíð við umleið 12.300 tonsum, var nakað størri í 2024 við knøppum 16.500 tonsum. Hendan gongdin helt fram í 2025 og var samlaða nøgdin knøpp 23.000 tons í 2025. Ein hækkan á knøpp 40%.

Hóast tað sjálvsagt er at fegnast um, at veiðan av upsa var uppgangandi í bæði 2024 og 2025, so skal hetta síggjast í mun til, at í árunum 2021-2023 var veiðan einans umleið ein slakur fimtingur av veiðuni í t.d. 2005 og 2006, tá ið yvir 70.000 tons av upsa vórðu fiskað.

Eisini nøgdirnar av **toski** hava verið smáar seinnu árini. í 2022 vóru avreiðingarnar av toski tann minsta úrtøkan frá føroyskum havøki í nýggjari tíð - 4.525 tons - og nøgdirnar hava samanumtikið verið søguliga lágar í árunum 2021-2023. Gongdin er tó blivin betur síðstu tvey árini. Í 2024 vóru avreiðingarnar av toski undan Føroyum uml. 6.600 tons, og í 2025 var nøgdin góð 11.300 tons – ein øking á 71% í mun til 2024.

At nøgdirnar av toski nú vaksa heldur enn at minka, er sjálvsagt gott, men her má eisini staðfestast, at mongdin framvegis er lág, um ein samanber við onnur ár.

## Útflutningsvirðið




Prísurin á hesum fiskasløgunum var til tíðir óvanliga góður í 2025. Hetta gjørdi, at útflutningsvirði av botnfiski, sum verða fiskað í føroyskum sjóøki, vaks nógv meira enn nøgdirnar. Samlaða útflutningsvirðið á hesum trimum botnfiska-sløgunum vaks úr umleið 425 mió kr. í 2024 til heili 803 mió kr. í 2025. Ein hækkan á heili 88,8% í mun til undanfarna ár.

Øll trý fiskasløgini høvdu lutfalsliga stóra framgongd í útflutningsvirðinum í 2025. Útflutningsvirðið á **hýsu** vaks við 71% í mun til undanfarna ár. Útflutningsvirðið á toski vaks við heili 213% og upsi við 163%. Í krónum var tað serliga toskurin, sum stóð fyri størstu økingini. Í 2025 bleiv toskur útfluttur fyri 436 mió kr í mun til 205 mió kr í 2024. Økingin er sostatt meira enn 231 mió kr. í mun til undanfarna ár.

## Útflutningur




Um hugt verður at samlaðu nøgdini – tá er innflutt rávøra eisini tald við - sum verður útflutt av botnfiskasløgunum toski, hýsu og upsa, sæst, at samlaðu nøgdirnar seinastu 10-15 árini hava verið javnt lágar á millum 30.000-

40.000 tonsum. Gongdin er tó blivin eitt vet betur síðstu tvey árini, har samlaða nøgdin er farin úr knøppum 34.000 tonsum upp í 40.000 tons í 2025. Ein hækking á 19% í mun til 2023

Hetta er tó langt frá, hvat nøgdirnar áður hava verið. Í 2025 varð tað serliga útflutt meira av upsa og toski, meðan nøgdin av hýsu var umleið tann sama sum í 2024.




Prísurin á vanligu botnfiskasløgunum toski, hýsu og upsa, hækkaði munandi í 2025, og útflutningsvirðið vaks tískil úr umleið 1.500 mió. kr í 2024 við heili 42% til 2.137 mió. DKK.

Nógv tann største partin av virðinum eigur toskurin, sum stóð fyri umleið 2/3 av útlfutingsvirðinum.

Lutfalsliga hækkaði virði á øllum trimum bólkunum eisini nógv. Útflutningsvirði á hýsu vaks við 63% í 2025 í mun til 2024, meðan útflutningsvirði av toski og upsa hækkaðu ávikavist við 36% og 52%.

# Viðtøkur

## Viðtøkur felagsins

**Lóg**

**fyri**

**Føroya Ráfiskakeyparafelag**

**§ 1**

Navn felagsins er FØROYA RÁFISKAKEYPARAFELAG og er heimstaður felagsins í Tórshavn.

**§ 2**

Endamál felagsins er at savna allar føroyskar ráfiskakeyparar til at útinna felags áhugamál og at verja áhugamál limanna.

**§ 3**

Ráfiskakeyparar kunnu gerast limir í felagnum við skrivliga at venda sær til felagið, og um nevndin játtar teimum limaskap.

Avgerð nevndarinnar kann av einum limi kærast fyri limfund, sum tekur endaliga avgerð.

**§ 4**

Aðalfundurin hevur hægsta ræðið í felagnum.

Atkvøðurætt á aðalfundinum hava felagslimirnir. Eitt árs eftirstøða inniber miss av atkvøðurætti.

Hvør limur hevur eina atkvøðu fyri hvørji byrjandi 1.000 tons av ráfiski, tó í mesta lagi 10 atkvøður.

Er limur eitt felag, eigur hann, ið skal útinna atkvøðurættin, áðrenn aðalfundin at prógva henda rætt fyri felagsformanninum ella fyri aðalfundinum.

Einans limur kann møta sum fulltrúi fyri annan lim og bert við skrivligari fulltrú frá avvarandi limi.

**§ 5**

Tann vanligi aðalfundurin verður hildin eina ferð um árið - ikki seinni enn 1. mai.

Nevndin ásetir tíð og stað fyri aðalfundin, sum verður kunngjørdur limunum brævliga við minst 8 daga ávaring.

**§ 6**

Øll mál, felagnum viðvíkjandi, kunnu viðgerast á vanligum aðal- ella eykaaðalfundi. Lógarbroyting kann bert fara fram, tá ið uppskot um lógarbroytingina er sett fram frammanundan, og uppskotið er lýst í kunngerðini um aðalfundin.

Til at broyta felagslógirnar krevst, at í minsta lagi 2/3 av teimum greiddu atkvøðunum eru fyri uppskotinum og at helvtin av limunum hava atkvøtt fyri.

Møta ikki nóg nógvir limir á vanliga aðalfundinum, har uppskot er frammi um at broyta lógirnar ella aðra samtykt, ið krevur í minsta lagi helvtina av øllum, ið eiga atkvøðurætt, skulu atkvøða fyri, kann samtykt verða gjørd um at kalla saman til eykaaðalfundar. Á eykaaðalfundinum kann slíkt uppskot

verða samtykt við minst 2/3 av teimum atkvøðum, ið eru umboðaðar á fundinum, sjálvt um ikki helvtin av limunum er á fundi.

Dagsskráin á vanliga aðalfundinum er henda:

1. Framløga av limalista

2. Frásøgn nevndarinnar frá farna ári.

3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi frá farna ári.

4. Val av nevnd.

5. Val av grannskoðara.

6. Áseting av limagjaldi fyri komandi árið.

7. Ymiskt.

Allar samtyktir á aðalfundinum skulu verða skrivaðar í gerðabókina.

Um ikki formaðurin leiðir fundin, kann aðalfundin velja ein fundarstjóra.

Har ikki annað er tilskilað í lógunum, verða allar avgerðir samtyktar við vanligum meiriluta.

Eingin kann greiða atkvøðu í egnari søk.

**§ 7**

Eykaaðalfundurin kann verða hildin, tá ið nevndin heldur tað verða neyðugt ella tá ið limir, ið umboða minst 10 atkvøður, krevja tað. Nevndin avger tíð og stað. Lýst verður til eykaaðalfund á tann hátt og so langa tíð frammanundan, sum nevndin avgerð.

**§ 8**

Í nevndini sita 3-5 limir, ið aðalfundurin velur millum felagslimirnar fyri 2 ár ísenn. Annað hvørt ár stendur helvtin av nevndarlimunum fyri vali, og annað hvørt ár stendur hin helvtin fyri vali. Er talið av

nevndarlimum ólíka tal, verður talið av nevndarlimum, sum standa fyri vali funnið við at runda upp til nærmasta heila tal annaðhvørt ár, og rundað niður til nærmasta heila tal annaðhvørt ár.

Umframt verður valdur 1 tiltakslimur hvørt ár.

Nevndin velur sjálv formann sín og næstformann. Á hvørjum nevndarfundi verður gerðabók førd, sum verður undirskrivað av hjástøddu nevndarlimum.

Nevndin setur kassameistara og skrivara.

**§ 9**

Nevndin tekur sær av áhugamálum felagsins, hevur fyrisætið við sjálvum felagnum og ansar eftir, at felagsins lógir og samtyktir verða hildnar.

Eingin kann verða við til av viðgera sína egnu søk. Allar avgerðir verða samtyktar eftir vanligum meiriluta.

**§ 10**

Felagsins roknskaparár er álmanakkaárið.

Roknskapur verður grannskoðaður av felagsins roknskapargrannskoðara. Roknskapurin fyri árið skal liggja frammi, uppgjørdur og grannskoðaður minst 14 dagar áðrenn ársaðalfundin.

**§ 11**

Hvør limur hevur skyldu til gjølla at halda felagsins lógir. Tær avgerðir, ið aðalfundurin ella nevndin taka, eru bindandi fyri limirnar.

Um limur tí ikki vil ganga undir eina tílíka avgerð, kann nevndin koyra hann úr felagnum uttan ávaring, og kann hann ikki gerast limur aftur tey næstu tvey árini. Áðrenn hann verður limur aftur, skal hann gjalda alla skuld sína til felagið.

Tvey árs eftirstøða inniber, at limur av sær sjálvum missir limaskapin. Áðrenn hann verður limur aftur, skal hann gjalda alla skuld sína til felagið.

**§ 12**

Árliga limagjaldið verður ásett á ársaðalfundinum. Fult limagjald verður eisini goldið fyri innlimingarárið. Inngoldið limagjald verður nýtt til rakstur felagsins í tann mun, sum nevndin, ið stendur aðalfundinum til svars, heldur at tørvur er á.

Skuldi felagnum verið tørvur á meira peningi fyri at fremja serlig mál, so kann nevndin royna at útvega henda pening við tilskotum frá limunum. Eisini kann aðalfundurin, til útvegan av slíkum peningi, álíkna limunum eykagjald á hvørjum kalendarári.

Ognir felagsins verða varveittar á tryggan hátt í banka, sparikassa ella í lánsbrøvum.

Nevndin hevur heimild til at tekna lutapening ella partapening í øðrum feløgum eftir góðkenning frá aðalfundinum.

Tekur felagið lán ella veðsetir ogn, mugu minst 4 nevndarlimir skriva undir.

Felagið verður bundið við undirskrift formansins ella honum, ið er í hansara stað. Til dagligu umsitingina av sjálvum felagnum kann nevndin geva skrivaranum fulltrú.

**§ 13**

Siga seg burtur úr felagnum kann eingin uttan við innskrivaðum brævi til felagið og við 6 mánaða ávaring, til ein 1. juli. Tó kann eingin fara úr felagnum meðan arbeiðstræta er, uttan so er, at nevndin gevur loyvi til hetta.

**§ 14**

Felagið kann verða tikið av við aðalfundarsamtykt, men einans tá ið minst 2/3 av samlaðu atkvøðunum í felagnum atkvøða fyri. Uppskot um felagsins avtøku má tó verða lýst fyri limunum eins og uppskot um lógarbroyting.

**§ 15**

Verður felagið tikið av, verða ognir felagsins at nýta til frama fyri føroyska fiskivinnu, soleiðis sum aðalfundirn tekur avgerð um.

# FØROYA RÁFISKAKEYPARAFELAG

Adressa
Óðinshædd 7
Postboks 1038

Telefonnummar
309900

Farteléfon
739911

Teldupostur:
ossur@industry.fo

Heimasíða:
www.industry.fo

